SJÚKRAHÚS VERKIÐ

## Spurningar og svar

1. Eru starvsfólk á LS, sum hava førleikar at luttaka í undirvísingini á serliga Modul 4. Løgfrøði - Modul 6. Betranararbeiði, virðir oa. - Modul 8. Skipanir?

Svar: Til modul 4 – løgfrøði vænta vit, at man tekur ein eksternan løgfrøðing inn, sum kennir til starvsfólka- og fyrisitingarlógina. Hetta kunnu vit finna útav saman, vit hava fleiri boð. Við tíðini kann okkara egni løgfrøðingur taka partar av tí. Til modul 6 – betranararbeiði, so hava vit starvsfólk innanhýsis, sum kunnu taka hendan partin. Viðvíkjandi modul 8 – skipanir, verður hetta eisini gjørt av innanhýsis starvsfólki.

2. Um tað eru uml. 20 luttakarar hugsi eg, at tað er skilabest, um tað eru tvey fólk/undirvísarar, bæði í samband við undirvísingina, ymiskt praktiskt, tá ið arbeitt verður við cases, organisatiónsvenjingum, bólkaarbeiðum osfrv. Um so er, at tað eru fólk á LS, sum hava førleikarnar at luttaka í undirvísingini, hvussu hugsa tit at avrokna tað? Skal tað takast við í tilboðið, ella er tað nakað, sum tit avrokna innanhýsis?

Svar: Um innanhýsis starvsfólk verða nýtt í arbeiðinum, so verður hetta avroknað innanhýsis.

3. Hvørjir førleikar eru annars á LS?
- Í mun til luttøku í ástøði undirvísingini “Ledelse i praksis, udgave 5”, 1., 2., 3., 5. og 9
- Í mun til luttøku í undirvísingini við organisatiónssálarfrøði/bólkadynamikki á Modul 7.

Svar: Sjúkrahúsverkið hevur ikki nakrar innanhýsis førleikar á hesum økjunum.

4. Tit skriva Typotest áðrenn farið verður undir modulini, skal tað verða ein ávís test, ella er tað í ordan, at tað er persónleikatestin NEO PI-3, sera djúp og nógv brúkt í samband við menning av bæði einstaklingum og leiðslubólkum umframt rekruttering.

Svar: Tað er ikki so týdningarmikið hvør testur tað er, so leingi tað gevur meining fyri arbeiðið framyvir.

•

5. Hvussu er við hølum til serliga støku dagarnar, eru hølir á LS, ella ynskja tit, at alt skal fara fram eksternt?

Svar: Væntandi verður arbeitt mest uttanfyri húsið, men tað er ikki neyðugt at taka hølisprísir við í tilboðið. Starvsfólkadeildin tekur sær av at samskipa hølir o.a.

SJÚKRAHÚS VERKIÐ

LANDSSJÚKRAHÚSIÐ

J.C. Svabos gøta 41-49
FO-100 Tórshavn

Tel. +298 30 45 00
ls@ls.fo

ls.fo